# Partick tapti aftur

**Skotska felagið hjá Jákupi Mikkelsen er nú um at verða fullkomuliga isolerað í botninum av bestu deildini**

SKOTLAND
*Jákup Mørk*

Jákup Mikkelsen var ikki í málinum, tá skotska felag hansara, Partick Thistle, leygardagin leikti móti Dundee United. Dundee hevur í ár sett sær sum mál at koma út í Europa at spæla, og í hesum royndum hava teir av álvara roynt at styrkt um hópin. Fyribils hevur hetta givið úrslit í, at italienski Fabrizio Ravanelli nú hevur fingið annað álopsplássið á liðnum, og tað var eisini hann, sum átti størsta lutin í einsamalla málinum í dystinum. Hetta skeyt spanski Nacho Novo, men tað var italski silvurrevurin, sum átti forarbeiðið til málið.

Umframt Ravanelli hevur Dundee boðað frá, at teir í løtuni royna at fáa avtalu í lag við Edgar Davids um at spæla við liðnum hetta kappingarárið. Tað tykist mest sum víst, at Davids – sum í løtuni er sáttmálabundin at Juventus – skal spæla við Roma næsta kappingarár, men fram til tá tykist vera sera avmarkað, hvat hann skal rokna við av spælitíð í Juventus.

Slíkan styrk kunnu Jákup og teir í Partick bert droyma um. Men einki er at ivast í, at tað vildi verið kærkomið, um onkrar heimsstjørnur skuldu leitað sær til teirra. Eftir fyrstu níggju umførini eigur liðið framvegis fyrsta sigurin til góðar, og munurin upp til næstu liðini veksur spakuliga, soleiðis at tað skjótt kann gerast meira enn møtumikið at skula lívbjarga sær í deildini.



*Heldur ikki hesaferð megnaði FCK at vinna heimadystin móti OB, sum sostatt hevur fingið fýra av seks møguligum stigum í Parkini í heyst*

# Brøndby framvegis oddalið

**Í toppdystinum megnaði FCK ikki at varðveita leiðsluna ímóti OB, og nú er superligan av álvara um at fara av um tvøran**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Eingin føroyskur fótbóltsspælari átti í vikuskiftinum lut í teimum seks dystunum, tá ið tað varð farið undir annan triðingin av hesum kappingarárinum. Eftir steðg orsaka av EM undankappingini næstsíðsta vikuskifti, var tólvta umfarið á skránni í hesum vikuskiftinum. Í alt skulu 33 umfør spælast, áðrenn tað verður greitt, hvør verður meistari, og hvør skal tungu leiðina niður í næstbestu deildina.

Jón Rói Jacobsen, sum framvegis hevur sáttmála við oddaliðið Brøndby, er langtíðarskaddur. Todi Jónsson, sum má metast at hava havt sera sannførandi fyrsta part av hesum kappingarárinum, er plágaður av skaða í lærkrikanum. Skaðin sigst ikki vera so ógvuliga álvarssamur soleiðis at skilja, at Todi verður ikki uttanfyri í nógvar vikur. Men tað hevur tikið eitt sindur longri tíð, enn tað hevur verið roknað við og vónað í FCK at fáa bilbukt við skaðan. Í FCK høvdu teir vónað, at Todi fór at vera førur fyri at spæla sunnudagin, men tá ið fimtan manna hópurin varð úttikin, var tað greitt, at tað var neyðugt at spara Toda nakrar dagar afturat.

Eftir tólv tey fyrstu umførini tykist kappingin at hava hug at fara av um tvøran. Brøndby er á odda við 26 stigum, og AaB er nummar seks við 20 stigum. Seks feløg eru í hesum ovara partinum. Umframt Brøndby og AaB eru tey Esbjerg, FCK, OB og FCM.

Seks feløg eru fyribils við í stríðnum fyri at sleppa undan niðurflytingar plássunum. Herfølge er sætti niðast við fjúrtan stigum, og AB er niðast við sjey stigum. Hini feløgini, sum í løtuni eru boð upp á niðurflyting, eru FC Nordsjælland, AGF, Viborg og Frem.

## Toppliðini vunnu

Undan vikuskiftinum var Brøndby oddalið, og tað eru teir framvegis. Teir vóru stórfavorittar í Århus. Brøndby vann 2-1 á AGF, men sigurin var ikki so lætt vunnin, sum støðutalvan kundi havt bent á, at hann fór at verða.

Fyritreytirnar hjá AGF vóru vánaligar. Teir høvdu einar seks spælarar á skaðalistanum, onkrir vóru við U-19 landsliðnum uttanlands, og so var neyðugt at hava tríggjar blaðungar spælarar, sum ongantíð høvdu spælt í superliguni, á beinkinum. Tveir 16 ára gamlir vórðu skiftir inn, og tað vísti seg í síðsta enda at vera ov stórur biti ímóti Brøndby, sum hevur fleiri landsliðsspælarar á sínum liði. Men tað stóð leingi 1-1, áðrenn Brøndby fekk eitt kloddamál og vann 2-1.

Esbjerg hevði í fýra teimum seinastu royndunum ikki vunnið á Viborg, men hesa ferð eydnaðist tað, hóast einki mál kom í 1. hálvleiki. Tað stóð 1-1 eina løtu, áðrenn tað eydnaðist hjá Esbjerg at skjóta sigursmálið. Harvið høvdu bæði tey fremstu fingið fult á útivølli.

## Borð um borð

FCK hevði í oysandi regninum og rættuliga heystarveðrinum seint seinnapartin sunnudagin vitjan av OB sum fyrr í hesum kappingarárinum vann 4-2 í Parkini ímóti FCK. Hjá heimaliðnum vóru umframt Toda Jónsson eisini Erik Mykland og Ole Tobiasen skaddir. Í álopinum vóru Peter Møller og Zuma. Tá ið seinna umfarið var meiri enn hálvrunnið, varð Zuma, sum ikki er í fullari dystarvenjing, skiftur út við Alberto Santos, sum higartil als ikki hevur livað upp til prátið um stórspælara og fastan málskjútta, ið var so nógv frammi mitt í summar.

Eftir verjukiks av teimum stóru hjá miðverjanum og landsliðsspælaranum Martin Albrechtsen legði Steffen Højer beinanvegin OB framum 1-0. FCK javnaði í 11. minutti. Peter Møller tamdi við rygginum ímóti málinum og eitt sindur frammanfyri nærra stólpan innlegg úr vinstru. Úr eitt sindur spískum lyfti hann bóltin afturum seg sjálvan. Ætlanin var at leggja innfyri, men bólturin smoygdi sær dygst inn við handara stólpanum. Tá ið tað restaðu tríggir minuttir av fyrra umfarinum tiltuskaði Thomas Røll sær brotsspark, sum liðformaðurin Peter Nielsen umsetti til hálvleiks leiðslu.

Talan var um verdugt toppstríð, og Steffen Højer skoraði til 2-2. Teir vóru tveir OB spælarar ímóti fimm FCK monnum, sum ikki sóu so sannførandi út í hesum støðuni. Nú er FCK nummar trý, og OB er nummar fýra.

## Frem og Herfølge spruttaðu

AaB sigursrøðin helt fram í Gladsaxe, har máttleysa heimaliðið, AB, sum nú er heilt isolerað í botninum og hevur tapt seks dystir á rað, legði rygg til 3-0 tap.

Eftir 11. umfarið skifti Frem venjara, tí teir høvdu tapt fimm ferðir á rað. Fyrsta uppgávan hjá gamla Aberdeen, Brøndby, Vejle og Brønshøj venjaranum, Ebbe Skovdal, var heimadysturin leygardagin ímóti FC Nordsjælland. Frem spældi sum ongantíð áður í hesum kappingarárinum, og teir vunnu 5-1! Kroatiski Mirko Selak slapp ikki á liðið, tá ið Ole Mørch var venjari. Nú hevði hann fingið pláss ímillum teir fyrstu ellivu, og hann takkaði fyri við at skjóta trý mál.

Herfølge var botnlið við nógvum skaddum spælarum, tá ið teir fóru at vitja FCM, sum higartil í hesum kappingarárinum ikki hevði tapt á heimavølli. Herfølge vann 2-0. Chris Hermansen skoraði upp á brotsspark, og tá ið heimaliðið royndi at kroysta seg til eitt stig, økti sami spælari eftir snarálop.





# Christian Høgni er álitið í Vejle

**Jann Ingi Petersen var á vøllinum í 75 minuttir, tá ið Fremad Amager á heimavølli misnýtti møguleikar og varð sektað við 1-0 tapi**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Christian Høgni Jacobsen hevur av álvara fingið ferð á málskjótingina í heyst. Um vikuskiftið skeyt hann bæði málini í Vejle-sigrinum á FC Aarhus*

Christian Høgni Jacobsen tykist rættuliga hava fingið høvdið fyri seg í Vejle. Eftir vitjanina í Århus, har Vejle vann 2-0 ímóti FC Aarhus og Christian Høgni Jacobsen var tvífaldur málskjútti, hevur føroyski álopsspælarin skorað sjey av teimum 21 málunum, sum Vejle hevur skorað í hesum kappingarárinum.

Vandi er sjálvandi fyri at taka munnin ov fullan, og beinini eiga at verða hildin á jørðini. Men um Christian Høgni megnar at halda um endan, sum hann rættuliga tykist hava fingið fatur á henda síðsta mánaðin, so kann tað verða so skjótt, at hann fer at verða innlimaður millum stóru málkongarnar í Vejle. Har er nógv at liva upp til. Her verður hugsað um nøvn sum Allan Simonsen, Iver Schriver, Tommy Troelsen, Steen Thychosen, sum nú er venjari í Vejle, og soleiðis kundi verið hildið fram. Ætlanin var ikki at leggja trýst á Christian Høgna, men heldur at vísa á, at í Vejle hava teir átt nógvar framúr málskjúttar. Seinastu árini hevur tað verið eitt sindur soltið, men nú tykist ein at hava víst rætta tevið.

Steen Thychosen hevur víst Christiani Høgna álit. At føroyski landsliðsmaðurin ikki enn er serliga kendur fótbóltsspælari í Danmark, hóast hann eisini hevur roynt seg í superliguni bæði við Esbjerg og Vejle, hoyrdist í Århus leygardagin. Christian Høgni skoraði til 1-0 í 47. minutti, tá ið hann úr vinstru sneiddi framvið tveimum, áðrenn hann skoraði, og ellivu minuttir seinni umsetti hann innlegg frá Peter Degn umvegis tvørtræið og í málið. Í báðum førunum eftir at føroyski spælarin hevði skorað, varð sagt í hátalarunum, at tað var Christian Høgni Jascobsen, sum hevði skorað!

Hóast tað nú eydnaðist at vinna á útivølli, so er støðan hjá Vejle framvegis einki serlig. Teir eru alt ov tætt at botninum, og tískil komu tey trý stigini sera væl við.

## Jann Ingi fyri fyrstu ferð

Fyrrverandi B68 spælarin Jann Ingi Petersen var fyri fyrstu ferð við í hópinum hjá Fremad Amager, og venjarin vísti honum álit beinanvegin. Jann Ingi var á miðvøllinum frá fyrsta bríksli, og hann var á vøllinum, inntil tað restaði eitt korter.

- Eg haldi, at tað gekk hampuliga væl hjá mær. At eg varð skiftur út mundi komast av, at eingin luft var eftir, heldur Jann Ingi, sum sigur seg harmast nógv um, at teir taptu.

- Serliga í 1. hálvleiki høvdu vit gott spæl og fleiri møguleikar, men vit fingu ikki mál, og so var einki at gera, tá ið teir miðskeiðis í 2. hálvleiki skoraðu og vardu leiðsluna. Mótstøðuliðið hjá Fremad Amager í Sundby var Fredericia. Fremad Amager er dygst omanfyri niðurflytingar strikuna. Leygardagin skulu teir spæla á útivølli ímóti Brønshøj, sum eisini er í tyngra endanum.

## Horsens tapti

Higartil hevði AC Horsens ongantíð tapt. Men sunnudagin endaði tað galið á heimavølli. Nýuppflutta FC Nordjylland vann 3-1. Hetta var fimti útisigurin hjá teimum á rað, og teir hava fingið fimtan av teimum nítjan stigunum á útivølli.

Randers FC og Silkeborg megnaðu ikki at taka seg inn á Horsens, sum tey hava havt frammanfyri seg alt hetta kappingarárið. Hjá Randers sá tað leingi gott út á Eysturbrúgv, har teir vóru frammanfyri 2-0 ímóti B93. Mne so vendi, og B93 vann 3-2. Sigursmálið fingu teir í yvirtíðini. Silkeborg vitjaði hitt niðurflutta liðið — Køge. Heimaliðið var á odda inntil farið var undir tíðina, sum dómarin hevði lagt afturat. Tá javnaði Silkeborg til 1-1.

HFK Sønderjylland og Ølstykke tóku seg eitt sindur nærri toppinum. HFK vann 6-0 á heimavølli ímóti Skjold, og Ølstykke vann 5-0 á heimavølli ímóti B1913. Børnshøj tapti 3-1 á heimavølli ímóti Nykøbing Falster Alliancen.

Trý umfør eru eftir undan vetrarsteðginum í næstbestu deildini. Síðsta umfarið verður 9. november, og tá kemur Jann Ingi Petersen heim at halda vetrarfrí inntil eftir ársskiftið.

**Danska superligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 12 | 8 | - | 2 | - | 2 | 20 | 8 | 12 | 26 |
| 2 Esbjerg | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 20 | 13 | 7 24 | |
| 3 FCK (M) | 12 | 6 | - | 4 | - | 2 | 19 | 11 | 8 | 22 |
| 4 OB | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 24 | 14 | 10 | 21 |
| 5 FCM | 12 | 6 | - | 2 | - | 4 | 19 | 15 | 4 | 20 |
| 6 AaB | 12 | 6 | - | 2 | - | 4 | 15 | 12 | 3 | 20 |
| 7 Herfølge | 12 | 4 | - | 2 | - | 6 | 11 | 14 | -3 | 14 |
| 8 Viborg | 12 | 3 | - | 4 | - | 5 | 21 | 22 | -1 | 13 |
| 9 AGF | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 17 | 25 | -8 | 13 |
| 10 Frem | 12 | 4 | - | 0 | - | 8 | 15 | 23 | -8 | 12 |
| 11 FC Nordsj. | 12 | 2 | - | 4 | - | 6 | 13 | 20 | -7 | 10 |
| 12 AB | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 9 | 26 | -17 | 7 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

**Danska 1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 24 | 8 | 16 | 31 |
| 2 Randers FC | 12 | 8 | - | 2 | - | 2 | 33 | 18 | 15 | 26 |
| 3 Silkeborg | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 25 | 10 | 15 | 24 |
| 4 Køge | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 25 | 16 | 9 | 24 |
| 5 HFK Sønderj. | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 22 |
| 6 Ølstykke | 12 | 7 | - | 0 | - | 5 | 30 | 23 | 7 | 21 |
| 7 Fredericia | 12 | 6 | - | 2 | - | 4 | 20 | 16 | 4 | 20 |
| 8 FC Nordjylland | 12 | 6 | - | 1 | - | 5 | 15 | 16 | -1 | 19 |
| 9 Skjold | 12 | 5 | - | 2 | - | 5 | 24 | 23 | 1 | 17 |
| 10 B 93 | 12 | 4 | - | 2 | - | 6 | 22 | 24 | -2 | 14 |
| 11 Vejle | 12 | 4 | - | 2 | - | 6 | 21 | 27 | -6 | 14 |
| 12 Nykøbing | 12 | 3 | - | 3 | - | 6 | 19 | 22 | -3 | 12 |
| 13 Fremad Amager | 12 | 3 | - | 3 | - | 6 | 16 | 22 | -6 | 12 |
| 14 FC Aarhus | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 11 | 32 | -21 | 7 |
| 15 B 1913 | 12 | 1 | - | 3 | - | 8 | 11 | 31 | -20 | 6 |
| 16 Brønshøj | 12 | 1 | - | 1 | - | 10 | 11 | 36 | -25 | 4 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Skotska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Celtic | 9 | 8 | - | 1 | - | 0 | 24 | 3 | 21 | 25 |
| 2 Rangers | 9 | 7 | - | 1 | - | 1 | 27 | 8 | 19 | 22 |
| 3 Dundee | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 12 | 10 | 2 | 14 |
| 4 Hearts | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 11 | 13 | -2 | 14 |
| 5 Livingston | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 10 | 10 | 0 | 12 |
| 6 Motherwell | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 10 | 12 | -2 | 12 |
| 7 Dunfermline | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 8 | 10 | -2 | 12 |
| 8 Hibernian | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 8 | 13 | -5 | 11 |
| 9 Kilmarnock | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 11 | 17 | -6 | 11 |
| 10 Dundee Utd. | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 6 | 16 | -10 | 8 |
| 11 Aberdeen | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 9 | 16 | -7 | 7 |
| 12 Partick | 9 | 0 | - | 2 | - | 7 | 7 | 15 | -8 | 2 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)